VESTNORDENFONDEN
MENNINGARGRUNNUR ÚTNORÐURS



# ÁRSROKNSKAPUR 2014

***Innihaldsyvirlit*** **bls.**


| Innihaldsyvirlit | bls. |
|---|---|
| Nevndarfrágreiðing | 2 |
| Átekning leiðslunnar | 5 |
| Grannskoðanarátekning | 5 |
| Rakstrarroknskapur 2014 | 6 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2014 | 7 |
| Peningastreymsútgreining 2014 | 8 |
| Viðmerkingar | 9 |



**ISLAND**: SIGTÚN 42 I IS-105 I REYKJAVÍK • **POSTADRESSE**: POSTBOKS 8096 I IS-128 I REYKJAVIK
**TELEFON**: +354 530 2100 • **WEB**: www.vestnorden.is • **E-MAIL**: vestnorden@vestnorden.is
**GRØNLAND**: AQQUSINERSUAQ 48A I POSTBOKS 798 I 3900 NUUK I **TELEFON**: +299 323 431

# N E V N D A R F R À G R E I Ð I N G

***Virksemið hjá Menningargrunni Útnorðurs:***

Í 2014 hevur Menningargrunnur Útnorðurs goldið 17,670 MDKK út í nýggjum lánum. Í 2013 var upphæddin 11,125 MDKK.
Gjaldførið hjá Menningargrunni Útnorðurs ger tað møguligt, at árligu útlánini í meðal kunnu vera 20 MDKK. Grundað á lága búskaparliga virksemið í Grønlandi og Føroyum seinastu árini, hevur tað verið avmarkaður eftirspurningur eftir lánum frá Menningargrunni Útnorðurs. Økingin av útgoldnum lánum í 2014 í mun til 2013 skal sostatt síggjast sum eitt jaligt tekin.

Tann føroyski búskapurin er ógvuliga nógv tengdur at gongdini í fiskivinnuni, tað vil siga eins væl gongdini í atkomuligari veiðunøgd sum heimsmarknaðarprísunum. Tann føroyski útflutningurin, tá ið skip ikki eru tald við, vaks í 2014 í mun til 2013 við 4,4%. Stórt sæð stavar allur vøksturin í útflutninginum frá alifiski, sum vaks við 21%. Tað eru framvegis uppisjóvarfiskurin og aldur laksur, sum standa fyri største partinum av útflutninginum. Føroyar ásettu sær í fleiri ár egna makrelkvotu, og var hon munandi størri enn undanfarin ár. Í 2014 gjørdu Føroyar avtalu við onnur strandalond um býtið av makrelfiskiskapinum. Luturin hjá Føroyum er 12,4% av samlaðu veiðunøgdini í Norðuratlanshavi. Alivinnan hevur eisini seinnu árini havt stóran vøkstur. Útflutningsvirðið av alilaksi var í 2014 methøgt, og var tað 47% av samlaða útflutningsvirðinum. Veiðinøgdin av toski, hýsu og upsa minkaði í 2014, og var hon tann lægsta síðani kreppuárini í 1990-unum. Tað hevði við sær, at fleiri av fiskavirkjunum fingu eitt ikki nøktandi úrslit í 2014.
Innflutningurin, skip undantikin, fall við 5,5% í 2014. Tað sýnir ein stíg í nýtsluni og løgum.
Arbeiðsloysið í 2014 fall í mun til 2013. Talið av fulltíðararbeiðsleysum var í november 2014 898 persónar móti 1.109 persónum somu tíð í fjør. Við ársenda 2014 var arbeiðsloysisprosentið 3,1% móti 4,2% í 2013.
Landskassin hevur eitt hall upp á 300 MDKK í 2014. Landskassin fíggjar hallið við at selja virðisbrøv. Um so verður, at altjóða rentustøðið hækkar, ella at føroyska kredittvirðið fellur, so kunnu øktar rentuútreiðslur avmarka møguleikarnar hjá samlaða búskapinum at fremja vøkstur í samfelagnum.

Grønlendski búskapurin hvílir í høvuðsheitum á einum árligum blokkstuðli úr Danmark og á at gagnnýta livandi tilfeingi, serliga rækjur. Blokkstuðulin var í 2014 3.681 MDKK og verður indeksreguleraður við prís- og lønargongdini í Danmark.

Í 2014 er samtykt at lækka kvoturnar fyri rækjufiskiskap, hetta er eftir náttúrufrøðiliga ráðgeving um gagnnýtslu av rækjustovnunum. Hækkandi rækjuprísir, ein góð makrelveiða, og fallandi oljuprísir hava útjavnað búskaparárinið av fallandi rækjukvotum. Fyri 2015 er eisini ein lækkan av rækjukvotunum. Hetta vil í útgangsstøðinum hava eina neiliga ávirkan á búskapin. Óvissa er um gongdina í øðrum faktorum so sum heimsmarknaðarprísirnar á rækjum og gongdina í oljuprísunum, um teir kunnu uppviga neiligu ávirkanina av lækkaðum rækjukvotum.

Byggi- og løguarbeiðið hevur havt eina afturgongd, serliga í Nuuk. Við at byrja eini tvey størri almenn byggiarbeiðir í Nuuk væntar byggivinnan, at tað aftur verður framgongd, og harvið vil hava eina jaliga ávirkan á búskaparvøksturin.
Í ferðavinnuni hevur í fleiri ár ikki verið vøkstur. Tað verða gjørd átøk at fáa fleiri ferðafólk, sum vitja Ísland, eisini at koma til Grønland. Tí er byrja flogsamband millum Ísland og Grønland, sum kann viðvirka eina jaliga gongd. Um hesi átøk geva jalig úrslit, kann tað hava við sær tørv á at útbyggja hotelkapacitetin og annað undirstøðukervi.
Teir nógv fallandi oljuprísirnir í 2014 hava havt neiliga ávirkan á áhugan hjá oljufeløgunum at leita eftir olju. Tí eru ongar ætlaðar oljuboringar í 2015.
Innan mineralumráðið er í 2014 ein mina byrjað. Talan er um eina minni námsfyritøku, sum serliga hevur týdning fyri búskapin í nærsamfelagnum, men námið er ikki av einari støddd, sum avgerandi vil ávirka samlaða grønlendska búskapin.
Heimsmarknaðarprísirnir á jarni og øðrum mineralum hava seinnu árini verið fallandi. Tí eru ætlanirnar frá undanfarnum árum at byrja eitt størri jarnnám ikki vorðin verunleiki.
Miðvísa arbeiðið hjá grønlendska sjálvstýrinum ígjøgnum fleiri ár við at skapa áhuga fyri at leita eftir og útvinna olju og miniralsk evnir hava soleiðis higartil verið skuffandi. Tað hevur tó týdning, at hildið verður fram komandi árini, so at tá ið heimsmarknaðarprísirnir aftur venda, at man tá kann tryggja leitivirksemið og byrja at útvinna av ráevnir.

Í Grønlandi hevur Menningargrunnur Útnorðurs í 2014 fíggjað fimm verkevni fyri tilsamans 6,5 MDKK. Tvey lán upp á 2,8 MDKK eru útgoldin til tvey verkstøð, eitt lán upp á 2,66 MDKK er útgoldið til eitt hotel, eitt lán upp á 0,6 MDKK er útgoldið til ein ferðabát og eitt lán upp á 0,5 MDKK er útgoldið til eina tænastufyritøku.

Í Føroyum hevur Menningargrunnur Útnorðurs fíggjað fýra verkevni við fýra lánum fyri tilsamans 11,170

MDKK. Tað eru útgoldin tvey lán fyri í alt 10 MDKK innan fiskiídnaðin, eitt lán upp á 0,5 MDKK er útgoldið til fyritøku innan grafiskt handverk, tvey lán upp á 2,25 MDKK eru útgoldin til tvær fyritøkur innan ídnað og handverk. Eitt lán upp á 0,67 MDKK  er útgoldið til eina tænastufyritøku.

Rentuinntøkurnar hjá Menningargrunni Útnorðurs vuksu í 2014 til 2,932 MDKK(2,881 MDKK í 2013). Samlaði rakstrarkostnaðurin til fyrisiting er 3,157 MDKK (3,173 árið 2013).
Frá afturfluttum burturleggingum til tap av útlánum og útreiðslur til veð vórðu inntøkuførdar 0,279 MDKK, meðan tað í 2013 vórðu inntøkuførdar 0,295.  Úrslitið frá rakstri, áðrenn burturleggingar, var eitt hall upp á 0,168 MDKK, móti einum halli upp á 0,234 MDKK í 2013. Úrslitið áðrenn burturleggingar var sostatt 0,505 MDKK minni enn í 2012. Úrslitið frá rakstri, áðrenn stuðul til NORA, gjørdist  111.503 DKK (60.806 DKK árið 2013). Sambært viðtøkunum sum vóru galdandi fram til 2013, skuldi eitt avlop upp til 1,5 MDKK latast NORA. Í roknskapinum fyri 2013 vóru 60.806 DKK  tí burturlagdar í roknskapinum.

Nevndin er av teirri fatan, at tað er ikki nøktandi, at rentuinntøkurnar vóru líka lágar sum undanfarna ár. Rentuinntøkurnar eru ávirkaðar av tí generella lága rentustøðinum. Rentuinntøkurnar eru variablar í samband við interbankrentuna CIBOR. Rentuinntøkurnar frá gjaldførinum eru eisini variablar, og eru tengdar at, hvørja rentu man kann fáa á innlánskonto í peningastovni.
Nevndin staðfestir við nøgdsemi, at tað hevur verið eitt minni fall í rakstrarútreiðslunum. Hetta skyldast serliga, at Grunnurin er fluttur í onnur hølir, og harvið klárað at spart í húsaleiguútreiðslum. Hesar sparingar fáa fyrst fulla ávirkan í 2015. Tað eru eisini sparingar til gerð av ársroknskapinum, sum ikki longur verður prentaður og sendur runt í papírsformi, men bert elektroniskt.
Nevndin heldur, at tað er nøktandi, at tað hevur verið ein hækkan í útlánum samanborið við undanfarna ár. Tað er eisini jaligt  at verandi lán eru av slíkari góðsku, at tað ikki hevur verið neyðugt at økt burturleggingar fyri at standa ímóti tapi.
Sæð undir einum, metir nevndin, at úrslitið fyri 2014, sæð í ljósinum av lága rentustøðinum og samfelagsbúskaparligu viðurskiftunum í Grønlandi og Føroyum, er nøktandi.

***Skrivstovur og starvsfólk:***
Menningargunnur Útnorðurs hevur skrivstovu í Reykjavík og Nuuk. Virksemið í Føroyum verður røkt úr Nuuk. Menningargrunnur Útnorðurs hevur tvey starvsfólk, tað sama sum undanfarin ár.

## ÚTGOLDIN LÁN

***Fimm lán vórðu útgoldin  til grønlendsk verkevni:***

| | | | |
|---|---|---|---|
| PBH Holding | • oljuflutningsbilur | 500.000 DKK | 5 ár |
| Arne Niemann | • ferðabátur | 600.000 DKK | 6 ár |
| Tasiilaq Auto | • verkstaður | 1.300.000 DKK | 15 ár |
| Motorværkstedet | • verkstaður | 1.500.000 DKK | 15 ár |
| Inuk Hostel | • hotel | 2.600.000 DKK | 10 ár |

***Fýra lán vórðu útgoldin til verkevni í  Føroyum:***

| | | | |
|---|---|---|---|
| Jens Reinert | • kavaravirksemi | 670.000 DKK | 6 ár |
| Tavan | • fiskiídnaður | 7.000.000 DKK | 10 ár |
| Valhalla | • fiskiídnaður | 3.000.000 DKK | 7 ár |
| Grafia | • grafiskur verkstaður | 500.000 DKK | 8 ár |

Útgoldin lán tilsamans til verkevni í útnorðri 17.670.000 DKK

## ÁVIRKAN AV LÀNVEITAN

Útlán Menningargrunn Útnorðurs í 2014 til Føroyar eru játtað til verandi fyritøkur. Hesar fyritøkur hava samanlagt 75 ársverk. Ein fyritøka hevur gjørt løgur í nýggjan útbúna fyri at betra um kappingarførið. Ein onnur fyritøka hevur havt sítt virksemi í leigaðum hølum, men við at keypa eina verksmiðju, hevur fyritøkan nú møguleika at halda fram við sínum virksemi í egnum hølum, umframt møguleikan at víðka um sína framleiðslu. Hini tvey lánini til føroyskar fyritøkur eru brúkt til løgur í betri útbúna.
Tey fýra av fimm lánum til grønlendskar fyritøkur vóru til verandi fyritøkur, meðan eitt lán var til eina nýstovnaða fyritøku. Tvær av fyritøkunum hava latið upp deildir í øðrum býum, enn har tær fyrr høvdu virksemi. Tað hevur útvegað níggju nýggj arbeiðspláss, harav trý eru lærlapláss.Tvær av fyritøkunum hava nýtt lánini til at betra um útbúnaðin. Nýstovnaða fyritøkan, sum Menningargrunnur Útnorðurs hevur veitt lán, er ein ferðavinnufyritøka, sum hevur bygt nakrar smáttur í útriðini av Nuuk, og sum verða nýttar til sovipláss fyri ferðafólk og skeiðsluttakarar. Her eru møguleikar at hýsa skeiðs- og mentunarvirksemi. Fyritøkan hevur trý nýggj arbeiðspláss.

## ÚTLIT

Búskapargongdin í teimum evropeisku londunum hevur í fleiri ár verið ávirkað neiliga av fíggjarkreppuni í fleiri londum. Tann stabilisering í búskapinum hjá teimum mest skuldarbundnu londunum, sum kundi staðfestast í 2013, helt fram í 2014. Í Evropa er framvegis talan um sera lágan búskaparvøkstur, men í USA hevur tað verið ein týðani øking í búskaparvøkstrinum og í nýggjum arbeiðsplássum.
Ígjøgnum 2014 hevur tað verið eitt ógvuliga munandi fall í oljuprísunum á heimsmarknaðinum. Hetta kann beinleiðis fáa eina jaliga ávirkan á búskaparvirksemið, tá framleiðslukostnaðirnir lækka. Samstundis týða lægri oljuprísir, at tað verður truplari at fáa lønandi oljuframleiðslu, og harvið minka løgurnar i oljuleiting og møguligari gagnnýtslu av oljuútvinnan. Tað er í fyrsta umfari, at tað merkist í londum sum Grønlandi, har kostnaðurin til leitan og útvinnan av olju er munandi hægri enn í nógvum øðrum umráðum.
Gongdin á rávøruprísunum av jarni og øðrum mineralskum vørum hevur eisini verið lág, og tað hevur havt við sær at leitan og útvinnan av olju í fyrstu syftu hevur havt neiligan týdning fyri lond sum Grønland. Altjóða feløgini innan olju- og mineralsektorin hava verið afturhaldandi við at byrja nýtt leitivirksemi í Grønlandi. Oljuleitivirksemið í Føroyum hevur heldur ikki givið jalig úrslit í 2014, og framhaldandi leiting er steðgað. Tað er tí bert eitt fátal av starvsfólkum á oljuleitiskrivstovunum í Tórshavn.
Nevndin væntar, sostatt ikki, at olju- og mineralleitan vil fáa avgerandi týdning fyri búskaparliga virksemið í Grønlandi og Føroyum í 2015. Tí vilja tær lokalu fyritøkurnar ikki fáa arbeiðsuppgávur við veiting til tey feløg, sum taka sær av leiting og møguligari seinni útvinnan.
Rentustøðið á heimsmarknaðinum, og ikki minst í Danmark, hevur verið lágt í 2014, og tað eru ikki útlit til at hettar broytist munandi í 2015. Við teimum búskaparligu útlitunum fyri búskaparligum virksemi í Grønlandi og Føroyum væntar nevndin, at útlánsvirksemið til vinnufyritøkur í Grønlandi og Føroyum, sæð undir einum, vil verða á sama støði í 2015 sum í 2014. Nevndin væntar at aftutgjaldevnini hjá lántakarum hjá Menningargrunni Útnorðurs gjøgnumgangandi framhaldandi vilja vera góð, men nevndin er eisini fyrireika, at tað kunnu koma tap av einkultum fyritøkum. Tað er sostatt nógmikið avsett í roknskapinum til at standa ímóti tøpum, sum kunnu roknast við í árinum.

Nevndin væntar at gjaldførið minkar í 2015, tí útgjald av nýggjum lánum fara at verða størri enn inngjald av avdráttum á verandi lánum. Samstundis fer tað fyri ein vaksandi part av lánum at verða ásett ein hægri minstarenta, enn tað hevur verið seinnu árini. Hendan gongd fer at hava við sær vaksandi rentuinntøkur, og tær væntast at verða á sama støði sum í 2014. Nevndin og dagliga leiðslan tryggja framhaldandi eina neyva stýring av fyrisitingarkostnaðinum, og tí væntar nevndin, at rakstrarútreiðslurnar í 2015 verða hildnar á sama støði sum í 2014 ella lægri.
Samlað væntar nevndin at úrslitið, áðrenn burturleggingar til at standa ímóti tapi, verður marginalt betri í 2015 enn í 2014. Ùrslitið frt tó ikki at verða nóg gott til, at tað gevur eitt nøktandi avkast av eginognini.

# ÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent ársroknskapin hjá Menningargrunni Útnorðurs fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014. Vit meta, at tann valdi roknskaparhátturin er hóskandi og gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarstøðu og úrsliti, umframt peningastreymi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014.

**Jørn Birk Olsen**
Grønland - formaður

**Oyvindur av Skarði**
Føroyar – næstformaður

**John Bernhard**
Danmark

**Elina Selinheimo**
Finnland

**Ásgerður Kristin Gylfadóttir**
Ísland

**Mari Mild**
Svøríki

**Tor-Egil Lindeberg**
Noreg

Undirskrivað á nevndarfundi í Oslo, tann 11. mars 2015:

**Sverri Hansen**
Forstjóri

# GRANNSKOÐANARÁTEKNING

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Til leiðslu og eigarar av Menningargrunni Útnorðurs.
Vit hava grannskoðað ársfrágreiðingina hjá Menningargrunni Útnorðurs fyri roknskaparárið 1. januar til 31. desember 2014.
Ársfrágreiðingin fevnir um leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, rakstrarroknskap, fíggjarstøðu, peningastreymsfrágreiðing, nýttan roknskaparhátt og viðmerkingar.

## Ábyrgd leiðslunnar av frágreiðingini

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum er í samsvari við lóg um ársroknskap í Íslandi. Henda ábyrgdin fevnir um at gera, innføra og viðlíkahalda innanhýsis eftirlit, sum er týdningarmikið fyri, at ársfrágreiðingin verður gjørd soleiðis, at rættvísandi mynd fæst, og er uttan týðandi skeivleikar, og uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Ábyrgdin hjá leiðsluni fevnir eisini um at velja og gera nýtslu av rímiligum roknskaparsiði og roknskaparmetingum, sum eftir umstøðunum mugu metast rímiligar.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu av ársroknskapinum. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi altjóða grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa eina grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum. Grannskoðanin fevnir um arbeiðið, soleiðis at grannskoðanin fær vissu fyri teimum upphæddum og upplýsingum, sum framganga av ársroknskapinum.

Grannskoðanin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hon um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrágreiðingini, uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðanin metir eisini u m innanhýsiseftirlitið, ið skal til, fyri at felagið kann gera eina ársfrágreiðing, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina í innanhýsiseftirlitinum.
Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársfrágreiðingin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið eitt nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

## Niðurstøða

Tað er fatan okkara, at ársfrágreiðingin gevur eina rættvísandi mynd av rakstrinum av Menningargrunni Útnorðurs fyri árið 2014, hansara ognum og skuldum við árslok 2014, peningastreymsfrágreiðingini fyri roknskaparárið 1. januar til 31. desember 2014, og at ársfrágreiðingin er í samsvari við lóggávuna um ársroknskap í Íslandi.

Reykjavík, tann 11. mars 2015

**Ásbjörn Björnsson**
Løggildur grannskoðari
Ernst & Young - Ísland

**Sveinn Arason**
Ríkisgrannskoðari

## RAKSTRARROKNSKAPUR *1. januar - 31. desember 2014*

| | Viðmerkingar | 2014 DKK | 2013 DKK |
|---|---|---|---|
| *RENTUINNTØKUR* | | | |
| Rentuinntøkur frá bankainnlánum | | 191.447 | 196.286 |
| Rentuinntøkur frá útlánum | 3 | 2.803.333 | 2.835.161 |
| Gjaldoyra og virðisjavni | | (63.202) | (150.338) |
| | | 2.931.579 | 2.881.109 |
| *AÐAR INNTØKUR* | | | |
| Aðrar inntøkur | | 58.020 | 58.021 |
| | | 58.020 | 58.021 |
| **Rakstrarinntøkur tilsamans** | | 2.989.599 | 2.939.130 |
| *RAKSTRARÚTREIÐSLUR* | | | |
| Lønarútreiðslur v.m. | | | |
| til fyrisiting og nevnd | 5 | 1.887.281 | 1.911.163 |
| Útreiðslur til fyrisiting | | 1.217.902 | 1.209.903 |
| Avskrivingar, íbúð | 6 | 51.972 | 51.972 |
| **Fyrisiting tilsamans** | | 3.157.459 | 3.173.038 |
| Tap og burturleggingar í árinum | 4 | (279.363) | (294.715) |
| **Tap og burturleggingar tilsamans** | | (279.363) | (294.715) |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | | 2.878.096 | 2.878.323 |
| *AVLOP* | | 111.503 | 60.807 |

## FÍGGJARSTØÐA *tann 31. desember 2014*

| Ogn | Viðmerkingar | 2014 DKK | 2013 DKK |
|---|---|---|---|
| *GJALDFØRI* | | | |
| Bankainnlán | | 34.434.281 | 34.969.371 |
| **Gjaldføri tilsamans** | | 34.434.281 | 34.969.371 |
| *ÚTLÁN* | | | |
| Útlán | 3 | 84.520.244 | 84.010.681 |
| **Útlán tilsamans** | | 84.520.244 | 84.010.681 |
| *MATERIELL STØÐISOGN* | | | |
| Íbúð | 6 | 2.575.512 | 2.627.484 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | 2.575.512 | 2.627.484 |
| *AÐRAR OGNIR* | | | |
| Skuldarar | | 36.067 | 46.937 |
| **Aðrar ognir tilsamans** | | 36.067 | 46.937 |
| *OGN TILSAMANS* | | 121.566.104 | 121.654.473 |

| Skyldur | Viðmerkingar | 2014 DKK | 2013 DKK |
|---|---|---|---|
| *ONNUR SKULD* | | | |
| Ognarar | | 108.148 | 263.673 |
| Burturlagt til NORA | | 0 | 66.915 |
| **Onnur skuld tilsamans** | | 108.148 | 330.588 |
| *LÁN* | | | |
| Lán - íbúð | 7 | 567.000 | 567.000 |
| **Lán tilsamans** | | 567.000 | 567.000 |
| *EGINOGN* | 8 | | |
| Stovnspeningur | | 91.284.091 | 91.284.091 |
| Tiltakspeningur, primo | | 29.495.362 | 29.495.362 |
| Flutt frá ársins úrsliti | | 111.503 | 0 |
| **Eginogn tilsamans** | | 120.890.956 | 120.779.453 |
| *SKYLDUR TILSAMANS* | | 121.566.104 | 121.677.041 |

## PENINGASTREYMSÚTGREINING *fyri 2014*

| | 2014 DKK | 2013 DKK |
|---|---|---|
| *PENINGASTREYMUR FRÁ RAKSTRI* | | |
| Úrslit ársins | 111.503 | 60.807 |
| Postar, íð ikki hava ávirkan | (198.558) | (200.826) |
| **Broytingar frá rakstrarroknskapi** | (87.055) | (140.019) |
| *PENINGASTREYMUR FRÁ LØGUM* | | |
| Avdráttir frá útlánum | 17.494.871 | 18.960.331 |
| Útgoldin nýggj lán | (17.670.000) | (11.125.000) |
| Skuldarar | (73.034) | 17.425 |
| **Broytingar, løgur** | (248.163) | 7.852.756 |
| *PENINGASTREYMUR FRÁ FÍGGING* | | |
| Ognarar | (139.065) | (16.460) |
| NORA | (60.807) | (66.915) |
| **Broytingar í fígging** | (199.872) | (83.375) |
| **Ársins peningastreymur frá rakstri, løgum og fígging** | (535.090) | 7.629.362 |
| **Gjaldføri primo** | 34.969.371 | 27.340.009 |
| **Gjaldføri ultimo** | 34.434.281 | 34.969.371 |

## 1. Upplýsingar um Menningargrunn Útnorðurs

Virksemið hjá Menningargrunni Útnorðurs er at læna pengar út til fyritøkur í Grønlandi og Føroyum, og undir ávísum umstøðum eisini í Íslandi. Høvuðssætið hjá Menningargrunni Útnorðurs er í Sigtúni 42, 105 Reykjavík, Ísland.

## 2. Nýttur roknskaparháttur

*Roknskaparháttur alment*
Ársroknskapurin er gjørdur í samsvari við lóg um ársroknskap í Íslandi. Ársroknskapurin er gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum í fjør. Øll roknskapartøl eru í donskum krónum.

*Virðisásetan*
Roknskapurin er gjørdur út frá ávísum fyritreytum, sum eru grundaðar á ávísar metingar. Hesar metingar ger leiðslan í Menningargrunni Útnorðurs í samsvari við nýttan roknskaparhátt, og við støði í søguligum royndum og fyritreytum, og sum leiðslan metir vera álítandi og realistiskar. Søluvirðið kann víkja frá mettum virði.

*Gjaloyra kursjavnan*
Rørslur í útlendskum gjaldoyra verða bókaðar til tann kurs, sum er galdandi tann dag, rørslan fer fram. Fíggjarlig ogn og skuld í útlendskum gjaldoyra verða virðisásett í roknskapinum við tí kursi, sum er galdandi ultimo í árinum. Kursbroytingar verða bókaðar í rakstrarroknskapinum. Kursurin ultimo 2014 var 0,048 (ISK/DKK), og ultimo 2013 0,047 (ISK/DKK)

*Materiell ogn*
Materiell ogn er tikin við í roknskapinum til útveganarvirðið, frádrigið avskrivingar.

*Útlán*
Útlán eru tikin upp til nominelt virði, og við burturleggingum móti tapi, sum ikki er staðfest. Burturleggingar av útlánum verða gjørdar bæði á hvørt einstakt lán og á bólkar av lánum.

*Burturleggingar av útlánum*
Burturleggingar av útlánum endurspegla tann váða, sum er tengdur at útlánsvirksemi. Talan er ikki um staðfest tap av útlánum. Broytingar í burturleggingum og staðfestum tapum síggjast í rakstrarroknskapinum og viðmerkingunum.

*Gjaldføri*
Gjaldførið í fíggjarstøðuni og peningastreymsútgreiningini fevnir um kassapening og bankainnlán.

*Inntøkur*
Inntøkur, t.v.s rentur av teimum lánum, sum Menningargrunnur Útnorðurs hevur útgoldið, verða inntøkuførdar, tá ið terminsútskrivingin verður gjørd.

## 3. Útlán

*Útlán greinað á lond*

| | Føroyar | Grønland | Ísland | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Samlað útlán | 34.783.092 | 49.441.840 | 295.311 | 84.520.244 |
| Rentuinntøkur av lánum | 1.206.580 | 1.504.972 | 91.781 | 2.803.333 |

Undir rentuinntøkum stava 161.025 DKK frá lántøkugjøldum. Undir fyrisitingarkostnaði eru bókaðar 169.550 DKK, sum eru útreiðslur til advokatar fyri teirra arbeiði at skriva lániskjøl og fáa tey tinglýst.

*Lán hjá Menningargrunni Útnorðurs*

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Hotel og ferðavinna | 36.94% | 37.80% |
| Handverk og smáídnaður | 38.70% | 29.67% |
| Fiskiídnaður | 14.15% | 8.62% |
| Aðrar vinnur | 10.21% | 23.91% |
| | 100% | 100% |

*Lán hjá Menningargrunni Útnorðurs greinað eftir restafturgjaldstíð*

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Avdráttir, íð falla innan 1 ár | 11.914.352 | 12.172.529 |
| Avdráttir, íð falla eftir einum ári og innan 5 ár | 45.326.879 | 37.083.865 |
| Avdráttir. íð falla eftir 5 árum | 27.279.013 | 34.757.287 |
| | 84.520.244 | 84.010.681 |

## 4. Burturleggingarkonto fyri útlán

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Burturleggingar primo | 14.806.936 | 17.037.185 |
| Burturlagt í árinum | (279.363) | (294.715) |
| Staðfest tap í árinum | (1.659.174) | (1.935.534) |
| Burturlagt ultimo | 12.868.399 | 14.806.936 |
| Burturlagt sum prosent av samlaðum útlánum | 13.21% | 14.98% |

## 5. Lønarútreiðslur

Lønarútreiðslur vóru tilsamans 1.887.585 DKK. Tað var løn til stjóra, starvsfólk og samsýning til nevnd sum er 75.000 DKK. Tað eru 2 heiltíðarstørv í Menningargrunni Útnorðurs. Nevndarsamsýningin er 10.000 DKK árliga fyri hvønn lim og 20.000 DKK til nevndarformannin. Harafturat fáa nevndarlimirnir fundarsamsýning fyri hvønn fund eftir galdandi reglum hjá Norrønu Ráðharranevndini. Eitt limaland hevur fráskrivað sínum nevnarlimi rætt til nevndarsamsýning.

## 6. Materiell støðisogn

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Útveganarvirði | 2.887.344 | 2.887.344 |
| Avskrivað primo | (259.860) | (1207.888) |
| Avskrivað í árinum | (51,972) | (51.972) |
| Bókað virði ultimo | 2.575.512 | 2.627.484 |
| Avskrivingartal | 2% | 2% |

## 7. Lán- íbúð

Afturgjaldingin av lánunum, sum Menningargrunnur Útnorðurs hevur tikið, byrjar í 2028, og lánini verða afturgoldin yvir 15 ár. Lánini eru rentufrí fram til 2028, tá ið afturgjaldingin byrjar. Tey rentu- og avdráttarfríu lánini eru veitt av Naalakkersuisut og Kommuneqarfik Sermersooq, við somu upphædd frá hvørjum.

## 8. Eginogn

*Eginognskonto*

| | Stovnspeningur | Tiltakspeningur | Úrslit ársins | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Eginogn primo | 91.284.091 | 29.495.362 | 0 | 120.779.453 |
| Úrslit ársins | 0 | 0 | 111.503 | 111.503 |
| Eginogn ultimo | 91.284.091 | 29.495.362 | 0 | 120.890.956 |